# Føroyskar pensjónir heili 40%

**Nýggjar samanberingar vísa, at í Føroyum eru pensjónir í ávísum førum heili 40% lægri enn tær eru í Danmark og ofta tekur tað eini tvey ár at avgreiða eina umsókn um pensjón**

PENSJÓNIR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Pensjónirnar í Føroyum er hopleyst afturútsigldar.

Tað vísir ein nýggj samanbering, sum Føroya Arbeiðarafelag hevur gjørt av pensjónunum í Føroyum og í Danmark.

Í summum førum eru føroyskar pensjónir heili 40% lægri enn tær donsku. Neb har, vit eru frægast fyri, eru tær føroysku pensjónirnar yvir 17% lægri enn tær donsku.

Tað eru kanska fyritíðarpensjónistar, sum eru serliga illa fyri í Føroyum, afturímóti í Danmark. Men eisini fólkapensjónirnar í Føroyum eru ímillum 20 og 30% lægri í Føroyum, enn tær eru í Danmark.

Á aðalfundinum í Føroya Arbeiðarafelag í morgun, upplýsti Ingeborg Vinther fyri fundarfólkinum, at í Føroyum eru gott 500 fyriøtíðarpensjónistar, ið fáa lægstu fyritíðarpensjón.

Her er talan um fólk, sum hava fingið ymisk heilsubrek ella eru slitin upp av arbeiði. Hetta eru eina mest verkafólk og fiskimenn.

– Viðferðin, tey fáa, tá ið tey ikki fáa arbeitt meira, er ótrúliga vánalig. Tá ið tey gerast heilsuveik, verður gingið frá einum lækna til annan fyri at fáa greiði á, hvat ið bagir. Ímeðan eru tey sjálvandi sjúkrameldað. Tíðin gongur, og sjúkradagpeningurin verður brúktur upp, so tey detta úr sjúkradagpeningaskipanini.

– Bíðað verður ofta upp í tvey ár og longur, áðrenn viðkomandi fær játtað fyritíðarpensjón, ið er 5.000 krónur um mánaðin.

– Men Síðani verða tey bara slept upp á fjall. Einki tilboð um eina møguliga eftirútbúgving ella okkurt lætt arbeiði.

Leggjast kann afturat, at vit hava fingið upplýst, at í Føroyum er lægsta fyritíðarpensjón skattskyldug. Viðvíkjandi miðal og hægstu avlamispensjónini, er grundupphæddin skattskyldug, men ikki viðbøturnar.

Tó er ein frádráttur í skattinum, men í kommunum við høgum skattaprosenti, kunnu tey koma undir at betala skatt.

Viðvíkjandi fólkapensjónini, er grundarupphæddin skattafrí, men ikki viðbøturnar.

Í Danmark hava tey frádráttir í skattinum. Men alt í alt hava pensjónistar í Føroyum nógv minni eftir til nýtslu, enn danskir pensjónistar hava, tá ið skatturin er tikin við.

### Ongan møguleika at fáa endarnar at røkka saman

Ingeborg Vinther sigur, at fólk, ið fær kr. 5.000 um mánaðin, hevur ongan møguleika at fáa endarnar at røkka saman, sjálvt um talan hvørki er um forsyrgjara, ella ein ið hevur lán at betala.

Hon vísir eisini á, at eitt uppskot varð lagt fyri Løgtingið um at hækka fyritíðarpensjónirnar og tað tóku bæði fyritíðarpensjónsbólkurin og øll arbeiðarafeløgini undir við.

Endamálið við uppskotinum var at avtaka lægstu fyritíðarpensjóninina, so at øll byrjaðu við miðal fyritíðarpensjón.

– Hetta hevði kostað landskassanum 18 milliónir krónur, sigur forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag.

– Talan er sostatt ikki um tað stóra í peningi, fyri at nakrir borgarar skuldu verið betur stillaðir, tá ið havt verður í huga, at hundraðtals milliónir verða nýttar til tunlar og tílíkt.

– Men alt veldst um, hvussu samgongan raðfestur, leggur hon afturat.

Men uppskotið varð felt við teirri umbering frá landsstýrismanninum í heilsu- og sosialmálum, at pensjónsviðurskiftini skuldi kannast.

Ingeborg Vinther helur, at

## FAKTA

**Munur á føroyskum og donskum pensjónum**

Av yvirlitinum sæst, at bruttopensjónir, sum er pensjón fyri skatt, eru munandi lægri í Føroyum enn í Danmark:

- Hægsta føroyska fyritíðarpensjón til støk er einans 11.438 kr. um mánaðin og tað er 78,4% av eini danskari pensjón.
- Hægsta føroyska fyritíðarpensjón til gift er einans 10.125 kr. um mánaðin, og tað er 82,9% av pensjónini í Danmark.
- Miðal føroysk fyritíðarpensjón til støk er einans 8.390 kr. um mánaðin, sum er 72,4% av teirri donsku pensjónini.
- Miðal føroysk fyritíðarpensjón til gift er einans 7.229 kr. um mánaðin og tað er 79,5% av upphæddini í Danmark.
- Lægsta føroyska fyritíðarpensjón til støk er einans 6.118 kr. um mánaðin og tað er einans 58,2% av eini tilsvarandi pensjón í Danmark.
- Lægsta føroyska fyritíðarpensjón til gift er einans 4.874 kr. um mánaðin og tað er ikki meiri enn 60,8% av eini tilsvarandi pensjón í Danmark.
- Føroysk fólkapensjón til støk er einans 6.713 kr. um mánaðin og tað er 72,0% av eini danskari pensjón.
- Føroysk fólkapensjón til gift er einans 5.282 kr. um mánaðin, sum er 77,3% av pensjónini í Danmark.

# Mugu bíða í 3-5 ár eftir pengum frá tryg

**Tað kemur ofta fyri, at fólk mugu bíða í 3-5 ár eftir at fáa nakað frá vanlukkutryggingini og tað er ein fíggjarlig vanlukka fyri nógv, sigur Ingeborg Vinther**

FA-AÐALFUNDUR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað kemur oftani fyri, at tað tekur eini 4-5 ár at avgreiða eitt mál hjá Vanlukkutryggingini.

Tað segði Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag.

Á aðalfundinum í Føroya Arbeiðarafelag í morgun, umrøddi hon vanlukkutryggingarnar.

Hon segði, at tað eru fleiri og fleiri limir í Føroya Arbeiðarafelag, sum gera vart við sína misnøgd í sambandi við vanlukkutryggingina, tá ið arbeiðsfólk fáa skaða á arbeiðsplássi sínum.

Eftir lógini hevur arbeiðsgevarin skyldu til at hava arbeiðsfólk síni vanlukkutryggjað.

– Fleiri av limum okkara hava víst á, at málini ikki eru avgreidd fyrr enn 3–5 ár eftir, at skaðin er hendur, og hetta er ein fíggjarlig vanlukka fyri nógvar løntakarar, sum koma illa fyri av skaða, og heldur ikki kunnu klára fíggjarligu skyldur sínar, sigur Ingeborg Vinther.

Hon vísir á, at sjúkradagpeningurin, sum verður goldin fyrstu tíðina, er í flestu førum ikki nóg mikið til vanligu útreiðslurnar hjá einum húsarhaldi.

### Nýggj lóg á veg

Fyri at royna at fáa broytt galdandi mannagongd, hevur Føroya Arbeiðarafelag verið á fundi hjá Hans Paula Strøm, landsstýrismann og har upplýsti, at arbeitt verður við eini nýggjari vanlukkulóg, og at henda lóg skal tryggja eina smidligari málsviðgerð og skjótari avgreiðslu og samstundis er ætlanin at dagføra tryggingarupphæddirnar.

– Landsstýrismaðurin segði, at tryggingarupphæddirnar fóru at verða hækkaðar, soleiðis at tær komu á sama stig sum í grannalondum okkara, segði forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag.

Hon vísti eisini á, at felagið nú hevur fingið uppskot til nýggja vanlukkutryggingarlóg til kunningar.

– Eftir ætlanini, skal nú skiljast ímillum endurgjald fyri mist arbeiðsføri og endurgjald fyri varandi mein.

– Endurgjaldið fyri mist arbeiðsføri verður útroknað sum eitt lívslangt gjald, ið verður goldið einaferð um mánaðin, og sjálv upphæddin verður roknað sum 80% av ársinntøkuni hjá viðkomandi løntakara seinastu árini fyri skaðan.

Útrokningargrundarlagið er í dagsins peningi 350.000 krónur um árið, soleiðis at endurgjaldið verður í mesta lagi 80% av tí, men, upphæddin skal dagførast eftir prísgongdini í samfelagnum.

– Endurgjaldið fyri varandi mein er ein upphædd, sum verður goldin í einum, og tað verður eisini hækkað

Ein serlig regla er í lógini um, at endurgjaldið fyri varandi mein verður lækkað 5% fyri hvørt árið tann tryggjaði var eldri enn 59 ár, tá ið skaðin hendi, tó ikki eftir, at tryggjaði hevur fylt 69 ár.

Ingeborg Vinther sigur, at Føroya Arbeiðarafelag fer at fylgja málinum gjølla og fer at gera vart við seg, um avgreiðslutíðin verður órímiliga long. Felagið fer eisini at royna at gera sína ávirkan galdandi, so at dagpeningurin og endurgjaldið veruliga koma at tryggja teimum, sum fáa skaða, eina rímiliga pengingaupphædd, soleiðis at eingin skal fara frá húsi og heimi orsakað av skaðatilburði, sigur Ingeborg Vinther.



*Vanlukkutryggingin arbeiðir so seint, at tað er mangan ein fíggjarlig vanlukka hjá teimum, sum koma illa fyri, segði Ingeborg Vinter á aðalfundi í Føroya Arbeiðarafelag í morgun*